Summar SURR



**Dagfinn Olsen**
*dagfinn@sosialurin.fo*

# Bert summar summar summardagar

Tað er summar. Í øllum førum eitur árstíðin soleiðis. Men summardagarnir hava verið fáir í ár. Mest hevur verið av regni, mjørka og eisini nakað av vindi.

Men tað ymiskt, ið er gott við hesum.

Tað er gott fyri gróðurin, siga tey, ið fáast við slíkt. Men nú fer eisini at sansa at hjá mongum av teimum, tí nú skal hoyggjast, og enn hevur ongin hoyterri verið.

Annað er, at vit hava okkurt at grenja um. Og tað er vælsignað at kunna gera tað, og vita, at flest øll eru so púra samd, og at tað neyvan er nakar, ið kallar teg eitt grenj, sum ongin skilir ella tímur at lurta eftir.

Tí fakta er fakta. Sóldagarnir hava verið fáir, meðan hásummarið er farið framvið, sum um onki var hent.

Men so hava vit tað at tosa og grenja um. Í felag. Og tað er fantastiskt! Onki er sum felagskensla. Hon er sterk. Tað er hesa kenslu, vit uppliva, tá vit eru til fótbóltsdyst ella enntá meira, tá vit hyggja at landsdysti. Ella tá vit halda ólavsøku.Vit eru partur av einum størri hópi.

Tann kenslan er sterk og hon er enntá sjálvforsterkandi. Tað er grenjið um veðrið kanska prógv um. Tá fleiri uttan at himprast taka undir, verður veðrið brátt lagt undir at hava verið nógv verri, enn tað í veruleikanum hevur.

Tá er nokkso skemtiligt, tá turru veðurfrøðingarnir, sum altíð boða frá vætu, koma við sínum hagtølum og siga, at tað hevur regnað so og so lítð í ár, og at sóltímarnir hava verið so og so mangir. Tá hongur mangan ikki saman hjá okkum vanligu veðursjúku.

Summarið er farið at hallað. Tey, sum er væl við bankan, eru aftur á klettunum og í tokuni, við gyltum enni og ørmum, og á blusum teirra verður boðað frá, hvat fyri eitt heitt stað tey - í ár - elska av heilum hjarta.

Her heima kódnar alt í mjørkatosi um vantandi sól. Tú veitst, hin...., sólin!!! Hon, sum bert hevur sæð einar fimm ella seks ferðinar í summar. Ella har á leið.

Men eftir stendur, at summar bert hevur verið summar summardagar í ár.



**Keðiligt flogfar**
Finska flogfarið, eitt Boring 757, var á veg úr Toronto til Helsinki.
*Portalurin*

## Gongutúrur úr Porkeri til Øravíkar

Sunnudagin 1. august verður útferð til Suðuroyar. Gingið verður úr Porkeri um Mannaskarð til Øravíkar.
Hetta er ein í støðum tungur túrur.
Farið verður við Smyrli úr Tórshavn kl. 11.00
Smyril siglir aftur til Havnar kl. 17.30.
Fólk verða biðin um at hava heit og góð gonguklæðir við, umframt ein heitan drekkamunn og matpakka.
Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

GONGUTÚRUR ÚR PORKERI TIL ØRAVÍKAR 1. AUGUST
WWW.TORSHAVN.FO



## Summarfestivalur í Klaksvík

So er aftur høvi at savnast og syngja við, tá fleiri av stjørnunum fara at framføra síni løg. Frá hóskvøldi 5. august til sunnumorgun 8. august fer Vágsbøur at vera karmur um ársins seinasta tónleikafestival, har bæði føroyskir og útlendskir bólkar og einstaklingar fara at framføra.

SUMMARFESTIVALURIN Í KLAKSVÍK FRÁ 5.-8. AUGUST
WWW.SUMMARFESTIVAL.FO

## Steypafinala í fótbólti hjá monnum

Fríggjakvøldið 6. august kl 18.00 spæla íf og eb/Streymur steypafinaluna. Finalan, sum seinastu árini hevur verið á ólavsøku, verður í ár fyri fyrstu ferð spæld í Klaksvík á Injector Arena meðan Summarfestivlaurin er.

STEYPAFINALA HJÁ MONNUM Í KLAKSVÍK
FRÍGGJAKVØLDIÐ 6. AUGUST KL 18





**Nýggjur útflutningur?**
Grind fyri 96 milliónir krónur
*Vágaportalurin*

## Bygdartúrur í Skopun

Sunnudagin 1. august verður ein forvitnisligur túrur runt í Skopun frá kl 14-16. Byrjað verður niðri á keiini, og nógv forvitnisligt verður tikið fram úr bygdarsøguni. Jens Marius Hentze sigur frá. Teistin siglir av Golmurætt kl 13.15 og úr Skopun aftur kl 16.30 og 18.30. Túrurin kostar 80 kr íroknað kaffi og vaflur.

BYGDARTÚRUR Í SKOPUN
SUNNUDAGIN 1. AUGUST



**Vorðið sum veitsla!**
Gistingarhúsini full á ólavsøku
*Dimma*

## Fyrilestur um uppvenjing eftir heilaskaða

Tað er felagið hjá teimum brekaðu, Javni, sum hevur fingið Tórunn Laksáfoss, cand. Scient í biokemi, at røða um venjingarháttin ABR mikukvøldið 4. august kl 20.00. Tórunn hevur í eina tíð nýtt ABR venjingarháttin til dóttrina.

Talan er um ein slóðbrótandi venjingarhátt, sum serliga er ætlaður til at rætta kroppin uppaftur eftir ein heilaskaða. Hátturin verður nýttur bæði til børn og vaksin, og øll, sum hava rørslutrupulleikar, kunnu fáa gagn av venjingini óansæð, hvør orsøkin er. Spastikarar eru sjálvsagdir til hesa venjingina, men eisini fólk við autismu og ADHD kunnu hava gleði av venjingini, umframt eldri fólk við heilaskaða. Venjingin gongur fyri seg heima og kann lýsast sum ein varlig trýstmassaga ígjøgnum eitt eitt bleytt evni.

FYRILESTUR Í MBF-HÚSINUM 4. AUGUST KL 20.00-22.00

**Hvussu so við Havnini?**
Ólavsøkan komin heimaftur í Føroyahúsið
*Dimma*



**Sýna fólk fram**
38 fólk við í ólavsøkuframsýningini
*Kringvarp.fo*

Summar
**Sosialurin** - Postsmoga 76 -110 Tórshavn - Tlf. 341800
Hugskot og viðmerkingar kunnu sendast til: post@sosialurin.fo
**Redaktørur:** Eydna Skaale